## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Glæman á Bryggjubakka



Starvsfólkini hjá Glæmuni á Bryggjubakka, f.v. Beinta Mortensen, Unn Øssursdóttir og leiðarin, Elsa Gaardbo Lützen

Mynd: Jens Kristian Van

**Um mánaðarskifti november/desember læt nýggi handilin Glæman upp á Bryggjubakka í Havn**

Glæman er ein deild hjá Teymavirkinum í Runavík, og handilin hevur eitt úrval av tí, sum Teymavirkið selur. Har er t.d. fiskireiðskap, arbeiðsklæðir og undirklæðir til børn og vaksin.

Adressan hjá Glæmuni er Bryggjubakki, men inngongdin til handilin er í sunnara enda á húsunum - millum Bryggjubakka og Vágsbotn.

Leiðari á Glæmuni er Elsa Gaardbo Lützen í Havn.

# Gentukór sang í SMS



*Mánakvøldið 20. desember sang eldra gentukórið í Ebenezer jólasangir á Torginum í SMS. Sangløtan endaði við at kórið og áhoyrarnir saman sungu jólasangin "Gleðilig Jól". Kórleiðarar eru systrarnar Charlotta á Váli Olsen og Brita á Váli Smith, og tónleikarar vóru Kári H. Olsen og Svend Åge Drewsen*

Mynd: Magnus Gunnarsson

## Team 85 í nýggj høli

Lýsingarfyritøkan Team 85 er í løtuni í ferð við at flyta virksemi sítt. Nýggi bústaðurin hjá fyritøkuni verður í Mykinesgøtu 5, har Fiskasølan eitt skifti helt til.

Stjórin í Team 85, Johnny Gaard, sigur við Dimmalætting, at teirra vón er, at viðskiftafólkini framyvir fara at uppliva eina meira streymlinjaða fyritøku.

Hartil sigur hann, at teirra val stóð ímillum at koma nærri Miðbýnum, ella at flyta út um bøgarðarnar, sum hann tekur. Og her var valið ikki so trupult. Fyri at hava alt virksemið í eini eind, ber snøgt sagt ikki til hjá teimum at finna eini høli í miðbýnum.

Í hølunum, har Team 85 higartil hevur hildið til, fer Føroyaprent framyvir at húsast.

-jm

## Tøkk

Vit takka fyri sýnda samkenslu og hjálp við deyða og jarðarferðina hjá

**Hans Petur Poulsen**

Tøkk til heimahjálp, gávur til Leirkeri og tykkum, sum vitjaðu hann.

**Alexandra, Hjalgrim og bróðurdøtranar**